Viðmerking:

# Hví er munur á – ella er munur á?

Jóannes Nielsen hevur í Dimmalætting tann 15/2 í ár eina grein undir heitinum ”Sólborg úr flotanum”. Høvuðsspurningurin verður sentralt orðaður í setninginum: ”Men hvussu ber tað til, at tað bara verður grátið um stjórar og vællønt fólk?” — og altso ikki, tá ið verkafólk og fiskimenn missa starv sítt, t.d. tí at eitt skip fer úr flotanum.

Í greinini er eitt av dømunum landsverkfrøðingurin Henning Jacobsen, sum var koyrdur úr starvi um jóltíðir 1998 — men sum eisini man hava sagt um 150 fólkum úr starvi. Rokna vit í arbeiðsplássum, so er talan heldur um gott 300 arbeiðspláss eftir um 5 árum mitt í krepputíðini.

Sjálvandi havi eg eins og onnur ”grátið”, um enn ikki alment, tá ið hesir mínir starvsfelagar fingu uppsagnarbræv, men eg havi ”grátið” alment um uppsøgnina hjá Henning Jacobsen — fyri at halda seg til málburðin hjá Jóanesi.

Málið um uppsagda landsverkfrøðingin hevur fleiri síður av almennum áhuga. Ein spurningur er, hvussu tað almenna fer við sínum borgarum og starvsfólkum. Størsta týdningin í hesum sambandi hevur tað helst, at Henning Jacobsen alment er ”karaktermyrdur” og harvið er ”invalideraður” sum starvsmaður innan sítt øki — leiðsluøki — uttan sjálvur at hava møguleika at verja seg.

Ein uppgáva hjá okkum øðrum hevur verið at vísa á, at talan var um karaktermorð — fólk omanfyri Henning í hierarkisku skipanini hava lagt uppgávurnar soleiðis til rættis, at hann ongan møguleika hevði at verja seg móti ákæruni: ”Tú ert ómøguligur at samstarva við.” Sami ”karaktermorðsteknikkur” verður enn brúktur.

Ein annar spurningur av almennum áhuga er, at Henning Jacobsen var okkara leiðari. Tann ovari myndugleikin hevur myndugleika at seta ein stjóra, men tað verða fólkini, sum mynda stovnin á gólvinum, sum gera stjóran til leiðara. Í demokratiska partinum av heiminum er hetta ein veruleiki, sum ovasti myndugleikin í tí einstaka førinum ger klókt í at fyrihalda seg til.

Tann ovari myndugleikin hevur loyvi til at siga okkara leiðara upp, men tann óhepni týdningurin røkkur væl longur út í arbeiðsplássið, enn ofta verður hugsað um — og orðað.

Aftur til høvuðsspurningin: Hví er munur á — ella er munur á?

Sjálvur fati eg tað ikki sum ein demokratiskan trupulleika, at eitt skip fer úr flotanum og annað kemur inn — ella aðrar natúrligar broytingar í arbeiðsmarknaðinum. Hetta er ein partur av tí, at vera liðiligur og at laga seg til nýggjar umstøður at taka við nýggjum møguleikum o.s.fr. (At Sólborg-dømið er eitt sindur øðrvísi, komi eg til seinni).

Men eg síggi fleiri demokratiskar trupulleikar í øðrum viðurskiftum — ikki bert tá ið leiðarar verða uppsagdir.

Tað var eitt demokratiskt afturstig fyri Føroyar, tá ið ”Biggi” var koyrdur úr starvi sum ruddingarmaður í Tórshavnar kommunu í kreppuárunum.

Tað var eitt demokratiskt afturstig fyri landið, tá ið kunningardiskurin í Vágum var ”privatiseraður”.

Og tað var eitt demokratiskt afturstig, tá ið Henning Jacobsen var sagdur úr starvi.

### Endurskoða demokratisku støðuna

Onnur dømi um demokratisk afturstig av hesum slagnum eru væl kend í landinum.

Um vit knýta heitið ”berufsverbot” ella ”karaktermorð” ella okkurt annað til hesi demokratisku afturstigini ger helst ikki tann stóra munin. Tað avgerandi er, at sjálv atgerðin er til lítlan sóma fyri einstaklingarnar, sum antin fremja atgerðina, viðurkenna atgerðina ella virka sum ”standin”. Enn minni er tað til nakran sóma fyri okkum, sum fólk, at vit ikki reagera týðuligari móti slíkum.

Tíanverri fyri okkum hevur tað í fleiri førum eydnast at geva okkara ”innara svínhundi” gott í beinini. Vit hoyra okkum sjálv siga onkran setning: ”Ja, hann var nú heldur ikki bara góður til _”. Karaktermorðið er framt, og vit hava medábyrgd.

Við orðunum hjá einum, sum altíð er áhugaverdur at læna oyra: ”Í 90-unum stakk muran fram í føroyinginum.”

Eftir míni meting er tíðin búgvin til at umhugsa demokratisku støðuna í landi okkara. Hetta er ikki minst týdningarmikið havandi í huga, at vit í hesum døgum leggja lunnar undir eina sjálvbjargnisleið.

Okkurt skip fer úr flotanum. Vit kunnu brúka tíð og kreftir til at forða einum natúrligum útviklingi og natúrligum útskiftingum. Men eg haldi tað vera skilabetri hjá fakfeløgum, arbeiðsgevarum og ikki minni hjá tí politiska myndugleikanum, at brúka tíð, kreftir og tankakapasitet til at skapa størri fleksibilitet og vilja til broytingar á arbeiðsmarknaðinum.

Tað kundi verið áhugavert, um vit komu hartil, at føroyski arbeiðsmarknaðurin er ein tann mest framkomni — t.e. fleksibli, vitandi og motiveraði - í heiminum.

Ein slíkur málsetningur var als ikki so veruleikafjarur fyri bert fáum árum síðani, men er í dag nakað væl tyngri at fáa á dagsskránna og enn tyngri at náa.

So, Jóannes, tú hevur í grein tíni – og í aftursvarinum tann 19. februar til dulnevnda í FF blaðnum - nortið við eitt mál, sum vit sum fólk og land gera klókt í at hugsa nærri um.

Vit skulu øll vera her. Leiðslurætturin er eitt nógv slitið hugtak. Leiðsluskyldan er nakað heilt annað og meira áhugavert – at hvør einstakur okkara átekur sær sín part av leiðsluskylduni. Hvør einstakur kann í minsta lagi átaka sær ein part av uppgávuni at leiða egnan arbeiðsdag og ein part av uppgávuni at samskipa innan egið starvsøki. Leiðsluskyldan verður eftir hesum hugburði ein partur av demokratisku skyldum okkara.

Tey, sum so koma soleiðis fyri, at fáa í hendurnar at røkja felags tilfeingi, annaðhvørt tað er fiskiloyvi, jørð, vitan, makt yvir øðrum menniskjum ella annað, hava eina serliga etiska skyldu, sum røkkur víðari enn at ”lívið er ein forrætning”.

Munurin millum stjóran og sjómannin verður tá ikki so stórur kortini. Báðir hava teir sín part av leiðsluskylduni. Báðir hava teir sín part av skylduni at røkja felags tilfeingi. Og báðir kunnu teir gerast fótatrakk hjá slíkum, sum vit mega liva saman við, men sum eru bæði sær sjálvum og okkum, sum fólki, til lítlan sóma.

**Signar P. Heinesen**



*Tey, sum so koma soleiðis fyri, at fáa í hendurnar at røkja felags tilfeingi, annaðhvørt tað er fiskiloyvi, jørð, vitan, makt yvir øðrum menniskjum ella annað, hava eina serliga etiska skyldu, sum røkkur víðari enn at ”lívið er ein forrætning”, skrivar Signar P. Heinesen millum annað í hesi viðmerking*

# Breiða semju innan ríkisfelagsskapin

Kaffi og siropskøkur. Tað er tað, ið vit minnast aftur á tað breiðu semjuna. Higartil hevur samgongan fulkomuliga einvíst hildið fast um fullveldisætlanina. Hóast Hvítabók, Caragata og Íslandska kanningin sýna, at lønarniðurskurður, arbeiðsloysi, skerjingar í livifóti eins og fráflyting er sannlíkur.

Vit hava nú í knapt 2 ár hoyrt um søguliga møguleikan, har allir flokkar á Føroya Løgtingi eru hugaðir at gera ríkisrættarligar broytingar. Broytingar, ið eru tiltrongdar, nú Heimastýrislógin er 50 ár.

Av tí at meira enn ein flokkur er á tingi, so er sjálvsagt eisini meira enn ein hugsan um hesi viðurskifti.

Samgongan fann felagsstev um at loysa Føroyar úr ríkisfelagsskapinum og skipa Føroyar sum fullveldi. Tíverri varð tjóðveldið sett at taka sær av hesum viðurskiftum. Harvið varð ein breið semja nærum útilokað frá byrjan av. At skeivt varð farið fram, hesum viðvíkjandi, munnu flest øll vera samd um. Tí Tjóðveldisflokkurin liggur so langt úti í loysingini, at tað er ringt, fyri ikki at siga ómøguligt er hjá hesum flokki at virka savnandi og semjusøkjandi í hesum spurningi. Best hevði verið at fingið eina so breiða semju at allir flokkar, umboðandi allar veljarar eru við. Samráðingarmandatið hevði verið ómetaliga sterkt, um breiða semjan varð funnin.

Vit vita, at stórur partur av veljarum hjá Fólkaflokkinum, Sjálvstýrisflokkinum og eisini partur av Tjóðveldisflokkinum, umframt nærum øllum Javnaðarflokkinum, eru fyri, at broytingar skulu gerast *innan* Ríkisfelagsskapin. Sambandsflokkurin tekur undir við at finna eina góða skipan *innan* Ríkisfelagsskapin. Hesir mongu veljarar eru sjálvsagt ímóti at Føroyar gerast fullveldi.

Tí er púra greitt, at tann breiða og sterka semjan liggur innan karmarnar av ríkisfelagsskapinum.



### Breiða semjan eigur at finnast innan ríkisfelagsskapin

Tað tykist ikki vera tørvandi politiskt hegni av løgmanni, ið er ein royndur politikari, at breiða semjan ikki er funnin. Heldur hevur skortað uppá viljan at finna slíka semju. Tí um hendan skal finnast, so skal fullveldið sleppast. Um ein slíkur vilji var tilstaðar, so var helst ein slík semja longu funnin, innan karmarnar av ríkisfelagsskapinum. Men sambært stýrisskipanarlógini hevði eisini verið neyðugt, at tikið flokkarnar, sum eru settir í andstøðu, við í samgonguna. T.d. Sambandsflokkurin fiskivinnumál, Javnaðarflokkurin almanna og heilsumál, Miðflokkurin oljumál. Saman skuldu allir flokkar funnið eina politiska semju, ið ikki eins og fullveldið hevði sett vælferðina uppá spæl. Eg ivist ikki eina løtu í, at møguligt hevði verið at funni eina slíka semju. Vit kundu síðan samrátt við donsku stjórnina um tær broytingar vit ynsktu framdar innan ríkisfelagskapin. Allir flokkar áttu sjálvandi at verið við, tí bert á tann hátt er tann breiða semjan umboða.

Tí ongin kann rokna við, at Sambandsveljarar góðtaka, at Tjóðveldisflokkurin skal umboða teir. Tað skal Sambandsflokkurin sjálvur gera. Tað sama er sjálvandi galdandi Miðflokkin eins og Javnaðarflokkin. Vit kundu staðið sum ein maður. Tað megnaðu teir ikki fyri 50 árum síðani. Tað kunnu vit nú.

Men tað krevur eitt politiskt hegni, sum Løgmaður hevur. Men tað krevur eisini ein vilja til semju av samgonguni, ið vit ikki hava sæð higartil.

Um ein breið semja skal gerast og fremjast, so skal annað til enn kaffi og siropskøkur.

**Marjus Dam,**
**løgtingsmaður**

# Yngd

Nr. 8 2000 SOSIALURIN




Reyð undirklæði eru in síða 16

Er eingin breidd verður heldur eingin elita síða 14-15

Allir vegir føra til Róm síða 13

Hitlistar & Svara So síða 17

Fløguumæli síða 18